

*- Eg havi altíð verið í góðum lag og havi sæð positivt upp á tingini. Soleiðis er tað eisini heima hjá okkum, og tað hevur hjálpt mær sera nógv. Familjan hevur verið ein stórur stuðul hjá mær gjøgnum alla hesa tíðina, og uttan tey hevði tað ikki borið til, sigur Willy Stampe*
*Mynd: Høgni Thomsen*

at hetta var einki fyri meg, og eg bæð enntá babba bestilla mær eina flogbillett heim. Men tað hjálpti sera nógv, tá ið eg byrjaði at síggja og merkja framgongd, og tað var eisini ein góð hjálp fyri meg, at tveir aðrir føroyingar eisini vóru har.

## Út at svimja klokkan 6

Lívið hjá Willy var mest sum vent upp og niður í Ebeltoft.

– Vit skulu í song klokkan 10 um kvøldið og fóru uppaftur klokkan 6. Tað var ein stór broyting fyri meg, tí eg var vanur við at hyggja eftir filmum og eta okkurt langt út á náttina. Nú kundi eg ikki longur eta tað, sum eg hevði hug til, og um dagin íðkaðu vit nógvan ítrótt. Sum tíðin leið, gjørdist alt lættari, og eg haldi eisini, at eg gjørdi meg harðan og stríddi meg ígjøgnum hetta.

– Ein vanligur dagur hjá mær kundi verða, at eg fór upp klokkan 6, súkklaði inn til Ebeltoft, har eg svam 1000 metrar í svimjihøllini. So æt eg morgunmat klokkan 8, aftaná tað vandu við í eini høll við góðum umstøðum, og aftan á døgurða var ofta meira venjing á skránni.

– Vit fingu eisini undirvísing um kroppin, um kost og annað, og vit sluppu sjálvi at royna at gera mat í køkinum. Starvfólkini vóru sera dugnalig, og tey dugdu væl at hjálpa og motivera okkum.

## Fer ikki svangur til handils

Willy var á skeiði í Ebeltoft frá 7. august og fram til 14. desember. Hann skuldi verða har eina viku longur, men tá hevði hann fingið nóg mikið.

– Tað var ein sera hørð tíð, og eg gavst eina viku áðrenn tíð. Tá hevði eg brúk fyri at sleppa burtur, so eg fór til Keypmannahavn í nakrar dagar at hugna mær, áðrenn eg so kom heimaftur.

Willy vigaði 132 kilo, tá ið hann vigaði mest, men eftir uppihaldið í Ebeltoft, var hann sloppin av við 52 pund og vigaði tá 106 kilo. Síðani hevur hann tapt seg 16 pund afturat, so at hann nú vigar 98 kilo.

– Eg helt, at tað fór at verða truplari at koma heim, men eg havi higartil klárað at hildið meg burtur frá sjokulátu og grill, og eg íðki framvegis nógvan ítrótt. Tað kann onkuntíð verða hart at ganga fram við hillunum við bommum og sjokulátu, men tað gongur, og eg havi gjørt mær tað til vana, at eg fari ikki svangur til handils.

## Lívið er nógv broytt

Gerandisdagurin hjá Willy Stampe er blivin ein heilt annar, eftir at hann legði tey mongu pundini eftir seg í Danmark.

– Alt er lættari nú. Nú síggi eg ikki longur stjørnur fyri mær, tá ið eg bukki meg niður. Tað er eingin trupulleiki at fara upp um morgunin, eg tími væl at fara til arbeiðis, og eg eri ikki so troyttur av gerandisdegnum. Eg havi eitt heilt annað yvirskot nú, og viðhvørt veit eg ikki, hvat eg skal finna upp á, tí eg havi so nógv energi.

– Fyrstu tíðina eftir at eg kom heim, upplivdi eg ferð eftir ferð, at fólk ikki kendu meg aftur. Eg heilsaði upp á fólk, men eg fekk onga reaktión, so tá kundi eg í øllum førum enn einaferð staðfesta, at eg var broyttur.

– Eg havi altíð verið í góðum lag og havi sæð positivt upp á tingini. Soleiðis er tað eisini heima hjá okkum, og tað hevur hjálpt mær sera nógv. Familjan hevur verið ein stórur stuðul hjá mær gjøgnum alla hesa tíðina, og uttan tey hevði tað ikki borið til, sigur Willy.

Sløk 80 pund lættari enn fyri einum góðum hálvum ári síðani, hevur Willy sett sær eitt nýtt mál fyri vektina.

– Málið er nú at koma niður á 94 kilo og at halda mær har, sigur hann.



*- Tað var blivin ein stórur persónligur trupuleiki fyri meg, at eg vigaði so nógv. Eg orkaði simpelten ikki at fylgja við í gerandisdegnum, sigur Willy*

## Fakta

**Navn:** Willy Stampe
**Aldur:** 21 ár
**Bústaður:** Klaksvík
**Arbeiði:** Timburmaður hjá Norðhús